


Vit átaka okkum alt innan timburarbeiði.

Vit átaka okkum eisini at gera tilboð.

**Leynar**
tlf. 211774


# Í BÝIN
– HVØNN HÓSDAG






# KROSSORÐ




## Vinnari:

*Aksel Eliasen*
*Millum Gilja 135*
*188 Hoyvík*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: VEÐRAMERKIÐ



## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**298**

**Loysunarorðið:** ............................................

Navn: ..............................................................

Bústaður: ......................................................

Bygd/býur: ....................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Mállæra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***




**Vika 16 – 17. apríl**
Vinnaratøl: **02 - 11 - 31- 32 - 33 - 35**

Eykatøl: **03 - 40**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **3.344.072,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **Eingin vinnari** |
| 5 vinnaratøl: | **5.651,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **146,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **43,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum





**BLÓÐBANKIN**
Telefon 311397


## VALUTAKURSIR

| | | 17.04.02 | Ultimo mars |
|---|---|---|---|
| USA | **Dollarar** | 837,3000 | 850,8100 |
| Bretland | **Pund** | 1209,3700 | 1211,0600 |
| Svøríki | **Króna** | 81,3100 | 82,5800 |
| Noreg | **Króna** | 97,3500 | 96,4300 |
| Sveits | **Frankur** | 505,5600 | 508,6600 |
| Ísland | **Króna** | 8,6100 | 8,4600 |
| Kanada | **Dollari** | 530,5600 | 533,7500 |
| Japan | **Yen** | 6,4113 | 6,3906 |
| | **Evra** | 743,5200 | 743,3500 |

FØROYA SPARIKASSI



# TILTØK

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Missiónsmøti – Súsanna, Sunrid, Kitty og Anna Maria vísa ljósmyndir og greiða frá ferð í India, har tær hjálptu til á kristnum kostskúla fyri gentum úr fátøkum heimum. Heimasíða okkara: www.hebron.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbliutími við Ingu Dam.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Palla Petersen, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti v/ Elisabeth Joensen. Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wladislaw Zdunek í Mariukirkjuni. (Talvan gongur fyri teimum, ið lesa til prest, í Keypmannahavnar bispadømi). Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Rhema á Hálsi**
*Bíbliuseminar við Fríðtór Debes verður 16.–21. apríl. Tema: »Tú ert signaður fyri at verða til signing!« Kl. 19-19.45: Undirvísing. Kaffistegður. Kl. 20.15-21.00: Undirvísing.*
Sunnudagin morgunmøti og sunnudagsskúli kl. 11.00. Øll eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 17 Evangeliskt møti, kl. 21 Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*Uppá Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta, kl. 14 Sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla, onki møti. Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri, hesaferð frá kl. 18.30 til uml. 23.30 vegna tað at farið verður túr. Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Møti v. Mourits Mourtisen, Meinigheitskórið.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Lovsangskvøld. Í morgin kl. 17 Landsbøn. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti v/ Alex O'Campo.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Møtiskrá hjá Hera Elttør**
trúboðara, á føroyavitjan hansara í døgunum 13.-26.4.
Fríggjakvøldið 19. kl. 20 Møti í Stranda missiónshúsi.
Leygarkvøldið 20. kl. 19 Møti á Sandi.
Sunnudagin 21. kl. 12 Prædikar við Gudstænastuna í Skopun. Kl. 18 Møti í missiónshúsinum í Skopun.
Flaggdagin 25. luttekur á LUS í Vestmanna.
Vitjar annars á skúlum o.a. í døgunum 15.-24. apríl.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánadagin kl. 20 Bíbil og bønarmøti, Apostlas. 22.
Telefonandaktin tlf. 424741.

**Funningur**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Niels Jacob Nielsen.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi. Hallmar og Hedvig Winther úr Skopun luttaka.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús, vitjan úr Noreg.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen. Barnamøti kl. 17.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Keldan, Skálafirði**
Bønarstevna verður í Kelduni 26. og 27. apríl við Britt Sólvi Vågane, úr Noreg. Til ber at tekna seg innan 24. apríl. Tú ert vælkomin í Kelduna.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Týskvøldið kl 19.30 Lovsangarnir møtast.
Mikukvøldið kl. 20 Hugnaløta fyri pør.
Hóskvøldið kl 20 Ungdómsmøti v/Hendrik Olsen.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti v/Hendrik Olsen
Leygarmorgunin kl. 10 Bøn.
Sunnudagin kl 14 Sunnudagsskúli. Kl 17 Møti v/Osbjørn Joensen.
Mánakvøldið kl. 20 Bíbliutími/ bøn.

**Aglow Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria, leygarkvøldið 20/4. kl 20.00. Sanna Hammer tosar. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Salem, Tvøroyri**
Felags kvinnumøti verður í Skúlahøllini í Trongisvági leygardagin 20. apríl kl. 16. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Karl og Jeannu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Sámal Jákup Joensen.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið.
Týsdagin kl. 20 Møti fyri soldátar og tilhoyrandi.

**Dagtilhaldið í Vági**
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61655400.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 15. apríl:*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 10.15-18 Vit mála
kl. 14-18 Kort- og bobbspæl, telving, dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 16. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Málprát, Jóhann H. W. Poulsen
*Mikudagin 17. apríl:*
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur, Skansan-Frúutrøð-Undir Glaðsheygg
*Hósdagin 18. apríl:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Domino binding
kl. 15-17 Liting av ull, Ása Hátún og Súsanna í Jákupsstovu
*Fríggjadagin 19. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 21. apríl verður gongutúrur eftir Kaldbakskambi til Kaldbaks. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Túrurin er miðaltungur og gingið verður í uml. 5 tímar. Havið heit og góð gonguklæði og ein matpakka við. Tilmelding.

**Vága Gongufelag**
fer túr, um viðrar sunnudagin 21. apríl kl. 14.00. Byrjað verður við rættina á Sunnara Suðurtriðingi og gingið suður á Bøsdalafoss. Havið góð gonguklæðir og kaffi við. Tilmelding á 213455.

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur verður sunnudagin 21. apríl úr Syðrugøtu, niðan Gjódal, um Tyril, yvir á Trælavatn og oman á Kambsdal. Vit møtast kl. 14 við A-húsið á veg oman til Syðrugøtu. Tilmelding á Eysturoyar Kunningarstovu tlf. 449449.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Bláí Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Bláí Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
Hoydalsvegur 40
3. hædd (ovast).
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12.
Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664 Beinta tlf. 310574 Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Føroyskt barnamøti**
Hvønn mánadag kl. 17 er føroyskt barnamøti í »Fælles Fælleshuset« á C. W. Obel kollegium á Herningvej. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk